Kappingarárið 2021

13. mars




Dagsins dystarbólt letur:

# Sune Jacobsen

Leikskrá nr. 2

## 07 Vestur

**Stovnað:** 6. novembur 2007

**Heimavallir:**
Dungasandur í Sørvági
Valloyran í Sandavági

**Postadressa:**
Dungasandur 4, Sørvágur

**Telefon:** 590707

**Telefax:** 333550

**T-postur:**
07vestur@07vestur.fo

**Heimasíða:** www.07vestur.fo

**Formaður:**
Jón Nordendal

**Næstformaður**
Jens Kristian Haraldsen

**Skrivari:**
Finnbogi Niclasen

**Peningarøkil:**
Ingibjørn Johannesen

**Nevndarlimir:**
Egil Petersen
Eyðvør Petersen
Ove Heinesen
Rógvi Jacobsen

**Ábyrgd:**
Fróði Poulsen

**Blaðbólkur:**
Fróði Poulsen
Ingolf S. Olsen
Jóanis Albert Nielsen

**Uppseting:** Regin Davidsen

# LEIKARIN HESAFERÐ

Navn: **Jóannis á Steig**

Føddur: **21-03-1997**

Hædd: **180 cm**

Vekt: **70 kg**

Pláss á vøllinum: **Vinstri bakkur**

Besti matur: **Ræst kjøt**

Heimsins besti fótbóltspælari er: **Virgil Van Dijk**

Onnur feløg tú hevur leikt við: -

Hvør er tann stuttligi á liðnum: **Tór Ingar**

Hvør er pressarin á liðnum: **Asbjørn**

Hvør á liðnum brúkar mest tíð frammanfyri speglinum: **Silas og Teitur**

Hvør er besti teknikari á liðnum: **Martin Tausen**

Besti tónleikabólkur: **Vágaverk**

Besti filmur/seria: **Prison Break**





# UPPTAKTIN

*V/ Jarnhold Nattestad*

**Leygardagin bresta uppflytararnir saman á Dungasandi í spennandi uppgerð um trý sera umráðandi stig. Og, um seinasti dysturin okkara millum er eftirfarandi, verður tað uttan floyalshandskar og við stórum undirhaldsvirði.**

Bæði liðini taptu fyrsta umfarið, og, hóast enn einki er avgerandi, fær úrslitið heilt víst ávirkan á vónirnar til úrtøkuna hetta kappingarárið, sum júst er byrjað. B68 høvdu trupla byrjan móti gull-kandidatunum úr Klaksvík og tað endaði við at 0-4 stórtapi á heimavølli, og vit, hóast til tíðir javnan dyst, taptu 0-2 móti B36.

Seinast vit møttu B68 á Dungasandi var í oktobur. Dysturin var rættiliga kontantur og til tíðir harður og rokaligur. Nógv var uppá spæl og tað var tíðiligt at hvørgin parturin ætlaði sær av vøllinum uttan stig.
Dann legði okkum á odda eftir hálvan tíma og vit áttu munin nærum allan dystin. Í yvirtíðini avgjørdi Marjus dystin eftir gott forarbeiði frá Zoran, og so kókaði yvir í seinasta minutti tá Radovanovic trumlaði ein av okkara niður. Tað endaði við reyðum til Martin og Radovanovic.

B68 hevur, eins og vit, styrkt um hópin til kappingina, og serliga áhugavert er tað, at teir fingu lokkað Lukasz Cieslewicz úr Gøtu inn á Toftir. Pólendingurin, hóast nú 33 ára gamal, fer uttan ivað at roynast toftamonnum ein fongur. Trýggir aðrir útlendingar eru komnir til felagið, umframt aðrar, har ímillum Steffan Løkin, sum er komin frá grannunum úr Runavík.

07 Vestur tóku sunnudagin móti B36. Dysturin varð til tíðir javnur, og vit høvdu okkara støður og onkran stóran møguleika, hóast vit beint undan dystarbyrjan máttu taka báðar miðverjarnar, Dann og Heina, av byrjanaruppstillingini. Eiler og Dánial Pauli royndust væl, men tað ávirkaði okkum uttan iva.

**Vit vóru omaná í fjør, tá vit møttu B68, og endaðu eisini 8 stig frammanfyri teir tá avtornaði, vit á 2. plássi og teir á 4. Men tað var í fjør. Nú er nýtt kappingarár og so er spurningurin hvør er betri fyri, betri fyrireikaður, hevur styrkt seg best og hvør dregur longra stráðið.**

# VESTMEK
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA



**Vestmek** bjóðar góða góðsku
fyri góðan prís





VESTMEK
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Bryggjan 17 380 Sørvágur Faroe Isands www.vestmek.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

sendistovan

Sand- og skervsølan
í Sandavági

Alt innan:
- tilfar
- veitan
- levering

Finn meg á
facebook

Tlf: 213577

Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

RISIN
BÓKHALDSVIRKI

TEL. 58 43 89

# NÚ SKULU KVINNURNAR ROYNA SEG

**07 Vestur-kvinnurnar hava spælt tveir vejingardystir og vunnið báðar. Næsta leygardag spæla tær sín fyrsta landskappingardyst í bestu kvinnudeildini. Rannvá í Løðu, primus motor, hevur góðar vónar um kappingarárið. Liðið hevur styrkt seg við trimum brasilskum spælarum**

***Ingolf S. Olsen***

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur 07 Vestur eitt lið við í bestu kvinnudeildini í fótbólti, Betri-deildin kvinnur, í kappingarárinum, sum byrjar næsta vikuskifti.

Fyrsti dysturin verður á heimavølli á Dungasandi í Sørvági næsta leygardag, og spenningurin er stórur. Dysturin er ímóti HB, og týsdagin í seinastu viku spældu 07 Vestur-kvinnurnar ein venjingardyst ímóti júst HB, sum tær vunnu.

- Eg haldi tó ikki, at tað var sterkasta liðið hjá teimum, sum vit møttu tá, men nú verður í hvussu er spennandi at síggja, hvussu støðið er í einum landskappingardysti, sigur Rannvá í Løðu, sum er ein av ídnastu stuðlunum hjá kvinnuliðnum hjá 07 Vestur.

## Primus motor

Hon sat í fleiri ár í nevndini í ungdómsdeildini hjá 07 Vestur, men tók seg úr nevndini fyri umleið tveimum árum síðan, tá hon hevði fingið eitt námsfrøðiligt leiðarastarv hjá Almannaverkinum.

Leiðin inn í ungdómsarbeiðið gekk tó í fyrsta lagi ígjøgnum teir fýra synirnar, sum allir hava havt og hava sín fótbóltsuppvøkstur í 07 Vestur. Áhugin fyri kvinnufótbóltinum kyknaði ikki av álvara, fyrr enn hon var farin úr ungdómsnevndini.

- Tað er ógvuliga krevjandi at sita í



***Rannvá í Løðu er primus motor hjá 07 Vestur-kvinnunum í Betri-deildini. Áhugin fyri fótbólti og felagsarbeiðnum er tó í fyrsta lagi komin ígjøgnum teir fýra synirnar. Fimm ára gamli Jónas, sum er við á myndini, er so smátt byrjaður, og hinir, 10 ára gamli Nóa, Jákup, sum er 15 ár, og Evald, sum er 18, eru allir vaksnir upp í felagnum***

nevnd í einum ítróttarfelag, so tá eg fekk eitt leiðarastarv, helt eg, at eg skuldi gevast við nevndararbeiðnum. Men eg eri so sera góð við 07 Vestur, og tá eg hevði stillað meg út á síðulinjuna organisatoriskt, sá eg knappliga felagið í einum breiðari høpi, greiðir Rannvá í Løðu frá.

Gentufótbóltur hevur alla tíðina verið í 07 Vestur, og kvinnurnar hava eisini havt lið í 1. deild. Men fleiri høvdu hug at stíla longur, og tá var Rannvá í Løðu mitt í rokanum og bleiv skjótt ein primus motor hjá fórbóltskvinnunum, tó at hon ongantíð sjálv hevur spælt fótbólt.

Sjálv er hon lítillátin og heldur seg ikki hava havt nakran avgerandi leiklut at fáa 07 Vestur-kvinnurnar at stíla hægri, og hon vísir millum annað á Andreu Petursdóttir, sum eisini ger eitt stórt arbeiði.

*(framhald á síðu 18)*




BANK**NORDIK**

**Heili 85% av føroyingum hava ikki nóg gott innlit í sína pensjón og sínar lívstryggingar. Ert tú ein av hesum?**

Kanna tína støðu á **banknordik.fo/pensjon**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

EM Asfalt

Tel. 22 51 10 & 22 47 16

**jn**.fo

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heill 6 metur til longdar.

**SANDAVÁGS TIMBURHANDIL**

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

# Bilasølan

S T U Ð L A R

ŠKODA



**Flott snið og týsk góðska, tá hon er allarbest.**


Sørvágs kommuna stuðlar 07 Vestur
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur • www.sorvag.fo


Vága kommuna stuðlar 07 Vestur
www.vaga.fo
VÁGA KOMMUNA

| Leikari | Aldur | Dystir | Minutir |
|---|---|---|---|
| Erling F. Myklebust | 25 | 1 | 90 |
| Asbjørn Heðinsson | 21 | 1 | 90 |
| Predrag Jeremic | 33 | 1 | 90 |
| Jóannis á Steig | 24 | 1 | 90 |
| Silas Eyðsteinsson | 23 | 1 | 90 |
| Eiler Fróðason | 18 | 1 | 90 |
| Dánial Pauli Lervig | 30 | 1 | 90 |
| Martin Heilberg | 25 | 1 | 90 |
| Martin Tausen | 31 | 1 | 90 |
| Tór-Ingar Akselsen | 40 | 1 | 87 |
| Ragnar Weihe | 20 | 1 | 79 |
| Albert Theis Nielsen | 22 | 1 | 11 |
| Marjus E. Nielsen | 18 | 1 | 3 |
| Ingi Joensen | 19 | 1 | 1 |
| Ari í H. Petersen | 18 | 0 | 0 |
| Sámuel Eyðsteinsson | 20 | 0 | 0 |
| Dann Fróðason | 21 | 0 | 0 |
| Heine Mortensen | 30 | 0 | 0 |
| Høgni E. Nielsen | 24 | 0 | 0 |
| Zoran Vojovic | 35 | 0 | 0 |
| Brandur Heinason | 19 | 0 | 0 |
| Teitur Olsen | 23 | 0 | 0 |
| Sølvi Egilsson | 26 | 0 | 0 |
| Trygvi Weihe | 17 | 0 | 0 |
| Nóa Eyðsteinsson | 16 | 0 | 0 |
| Venjari: Heðin Askham | | | |

| Leikari | Aldur |
|---|---|
| Erlend Jacobsen | 21 |
| Aleksandur Jensen | 19 |
| Leivur Højgaard | 25 |
| Andri Benjaminsen | 22 |
| Chris Jastrzembski | 24 |
| Lukasz Cieslewicz | 33 |
| Bárður Jensen | 19 |
| Áki Johannesen | 18 |
| Tonni Thomsen | 22 |
| Steffan Løkin | 20 |
| Esmar Clementsen | 24 |
| Karstin Clementsen | 19 |
| Fríði Petersen | 17 |
| Jann Ingi Petersen | 37 |
| Aron Hansen | 16 |
| Jákup Højgaard | 19 |
| Hilmar Højgaard | 17 |
| Joakim Jurs | 24 |
| Venjari: Øssur Hansen | |

unicar.fo

BILÚTLEIGAN, OG EISINI UMVÆLA VIT SKAÐAR,
LAKKERA OG SKIFTA RÚTAR + 298 544000

# STIGATALVAN

| # | | Lið: | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | KÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 4 | 0 | 4 | 3 |
| 2 | | HB | 1 | 1 | 0 | 0 | 5 | 2 | 3 | 3 |
| 3 | | B36 | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 4 | | Víkingur | 1 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 | | EB/Streymur | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 | | ÍF | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 7 | | TB | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 8 | | 07 Vestur | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| 9 | | NSÍ | 1 | 0 | 0 | 1 | 2 | 5 | -3 | 0 |
| 10 | | B68 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 4 | -4 | 0 |



CARRO
carro.fo - 21 25 51

FAE VÁGA FLOGHAVN

Giljanes bussar koyra um alt landið




Tel. 21 98 99 giljanes@giljanes.fo

.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa Vágaportalin

.fo
Vágaportalurin







FOSSÁ

FROZEN FISH
LANDING

Hølcksmíð
v/Gerhard Hansen

Alt innan
timburar-
beiði

Tlf. 282710



Neinbjørn Nattestad
Bilverkstaður
Tlf. 332727 | Fax. 333727

MÚRARIN

V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo


BETONG RUNT ALT LANDIÐ
58 50 25 ella 31 50 60
Vit veita eisini vegleiðing í sambandi við betongsløg og styrki
Blandistøðin er góðkend av Norska Kontrollrådet
J&K BETONG
J&K
BETONG 31 50 60


Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo
mykines.fo
must see from sea

(framhald av síðu 7)

- Tað vóru nakrar á liðnum, sum høvdu hug at royna seg í bestu deildini, og tá vit høvdu tosað aftur og fram um hetta eina tíð, um vit skuldu gera tað nú ella kanska bíða í eitt-tvey ár, so bleiv avgerðin tikin um at fara all-in nú. Eg og øll hini rundan um royna so bara sum frægast at standa á síðulinjuni og kempa fyri, at tað skal rigga, sigur Rannvá í Løðu.

## Úr Vágum og Brasil

Høgni Egilstoft hevði vant kvinnurnar hjá 07 Vestur, men tá liðið hevði teknað seg til Betri-deildina, varð royndi venjarin Frankie Jensen settur sum høvuðsvenjari hjá kvinnunum. Frammanundan hevði hann verið høvuðsungdómsvenjari hjá FC Hoyvík. Høgni Egilstoft er nú hjálparvenjari, og Pól Hendrikur Andreasen, nýggi fysiski venjarin hjá 07 Vestur, er eisini knýttur at besta kvinnuliðnum.

Kvinnurnar á liðnum eru úr allari oynni – úr Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø – men harafturat hevur liðið styrkt seg við trimum brasilskum spælarum – ein stendur í málinum, ein er bakkur, og ein spælir har frammi.

- Tær vóru leysar av sóttarhaldi dagin fyri venjingardystin ímóti HB og vóru eisini við í venjingardystinum



ímóti AB/B71 seinasta leygardag. Tær síggja út til at fella væl til, so vit vóna, at tær fara at tæna okkum væl, sigur Rannvá í Løðu.

## Góð kensla

07 Vestur vann eisini venjingardystin ímóti felagsliðnum AB/B71 á Argjum seinasta leygardag – úrslitið var 1-0 til 07 Vestur. Tann dysturin var spældur sum ein partur av venjingarlegu, sum 07 Vestur-kvinnurnar høvdu seinasta vikuskifti. Tær búðu á Hotel Vágum, og umframt nógva venjing og venjingardystin ímóti AB/B71 var eisini nógv gjørt burtur úr sosialu samveruni at sjóða liðið væl saman.

Hjá Rannvá í Løðu er kvinnuliðið blivið eitt hjartabarn, tó at hon ikki hevur nakra formliga ábyrgd av liðnum.

- Tá tú gert eitt sjálvboðið arbeiði fyri okkurt, tú brennir fyri, so gevur tað nakað heilt annað enn arbeiði, sum tú fært løn fyri at gera. Eg veit ikki rættiliga, hvat tað er, men tað gevur eina góða kenslu – sjálvt um tað sanniliga kann vera ræðuliga strævið eisini, sigur hon.

## Góðar vónir

Rannvá í Løðu sigur, at hon altíð er bjartskygd og hevur eisini góðar vónir um kappingarárið hjá 07 Vestur-kvinnunum.

- Eg vóni, at vit enda onkustaðni í miðjuni í deildini. Men tað týdningarmesta er, at liðið mennir seg. Eg síggi tað sum eina skyldu, at vit



royna at hava allar deildirnar við í 07 Vestur, eisini hjá kvinnunum. Tí nógvar av teimum byrja kanska sum sjey ára gamlar, og vit venja tær so allan vegin uppeftir, men higartil er tað steðgað, tá vit koma til bestu deildina – og so eru tær farnar aðrastaðni at spæla fótbólt. Nú kunnu vit so eisini bjóða teimum bestu deildina, og sjálvandi er tað ynskiligt, at uppaftur fleiri tilboð verða, 1. deild og old-girls til dømis, og eg vænti, at tað eisini kemur, sigur hon.



mánadag til leygardag | **9-22**



Dalsbø Sp/f tlf. 228991




VESTPACK

VESTPACK

VESTPACK

Handilsvirkið Niclasen

Timburhandil og byggibúð



Handilsvirkið Niclasen - Bakkavegur 26
Teldupostur: niclasen@niclasen.fo
TLF: 33 20 01 - FAX: 33 20 50

SMIÐJAN
TEL. 30 88 88

Klima

MTHøjgaard

Movement that inspires

# Seyðamjólking í Vágum í fornum døgum?

Í greinini *Heimildir um seyðamjólking í Føroyum, Fróðskaparrit 25*, bók, 1977, viðger fornfrøðingur A. Thorsteinson spurningin, um seyðamjólking nakrantíð er farin fram í Føroyum. Hann meinti tá, at keldugrundarlagið í Føroyum var ov vánaligt, fyri at man kundi siga nakað fyri vist um hetta.

Í mondul nr. 3, 8. Árg. 1982, var støðan tó ein onnur. Fornfrøðingurin T. Diklev hevði undir einum útgrevstri á Sandi, funnið eitt Kelvi (ið er ein træpinnur, sum varð settur uppá tvørs í munninum á lambinum, so tað ikki fekk sogið). Hetta var eitt prógv um, at seyðamjólking veruliga var farin fram her á landi; samstundis var A. Thorsteinson vorðin varugur við, at staðarnavnið "Lambhagi" og onnur nøvn, ið innihalda orðið "Lamb" hava samband við seyðamjólking.

Mett verður at hetta virksemið er farið fram í víkingatíð og tíðliga í miðøld.

### Seyðamjólking

Í Norra og Íslandi hevur mann mjólkað seyði heilt frá landnámstíð og fram til okkara dagar.

Keldur frá 1700-talinum siga frá, at á vesturlandinum mjólkaði mann bæði seyði og geitum. Seyðamjólkin varð ofta blandað saman við kúgvamjólk og gjørd til ost. Seyðaostur var tiltikin góður, av tí at mjólkin var so feit. Mann skilti lombini frá ónum um náttina, so at júgrini á ónum vóru full um morgunin. Síðan var mjólkað áðrenn lombini sluppu til.

Tað var sagt, at seyðamjólkin var tann besta og sterkasta mjólkin, ið mann kundi fáa.



***Mynd 1: Frágarðarnir hómast omanfrá vestara og mittasta armi á dubultbólinum á Lambatrøðni***

(Mynd J. S. Hansen)




***Mynd 2: Íslendskt dupultból nevnt "Lambakró", við rúmi, ið lombini vóru sett inn í um náttina.***
(Daniel Brun, 1897)

Tey gjørdu eisini tað, ið tey nevndu fyri "sauetjukke", sum var høgt í metum. Hetta var smurt uppá kaku og breyð. Eisini gjørdi mann seyðamjólkina til mjólkasuppu.

## Seyðamjólking í Miðvági?

Tá eg fyri nøkrum árum síðani gekk ein túr í lendinum omanfyri dubultbólið á Lambatrøðni í Miðvági var eg varugur við, at tað, sum kundi sæð út sum leivdir av tveimum frágarðum, gingu omanfrá tí vestara rúminum á hesum bóli. (Sí mynd 1).

Hetta vakti mína undran, tí eg visti, at staðarnavnið, "Lambi", hevði samband við seyðamjólking, og at eg hevði lisið, at í Íslandi hevði mann líknandi ból, sum vóru nýtt í hesum sambandi. (Sí mynd 2).

Vit hava ongar samtíðar keldur um seyðamjólking í Føroyum, tó setur J.C. Svabo (Djurhuus 1976) orðið kvíggj í samband við eitt stað uttangarðs, sum mann fyrr í tíðini mjólkaði seyði.

Í Íslandi og Norra hevur mann, sum áðurnevnt mjólkað seyði heilt fram til okkara tíð. Mannagongdin var, at lombini sluppu at súgva til í juni (eftir Jóansøku); so skilti mann lombini frá ónum um náttina, so at mann kundi mjólka teimum morgunin eftir. Hetta var millum annað gjørt við, at mann nýtti eina Lambakróð (sí mynd 2), har lombini vóru í einum rúmi fyri seg um náttina, og ærnar fyri seg (Thorsteinson 1977: 82).

## Greining av Dubultbólinum á Lambatrøðni (sí mynd 3)

Garður nr. 1 tekur seg upp við ein stóran stein, sum er í lendinum frammanfyri bólið, og heldur áfram niðan til ein annan stóran stein, ið liggur tætt við tann mittasta armin á bólinum.

Garður nr. 2 byrjar longur niðri og endar tætt við vestara arm á bólinum, har eitt møguligt portur hevur verið í. Tað vil siga, at vestara rúm, "a", hevur møguliga verið nýtt til at rikið seyðin í; so hevur mann tikið lombini frá og sett tey í eystara rúm, "b"

Tað er eisini væl møguligt, at tvey portur hava verið við steinin, ið liggur frammanfyri rúm "b", eitt vinstrumegin steinin, ið var nýtt, tá lombini vóru tikin inn, og eitt høgrumegin, ið var nýtt, tá lombini vóru slept út aftur. Tað er eisini ein møguleiki fyri, at ein takstólpi hevur staðið á hesum steini, og at rúm "b" hevur verið takt, eins og rúm "b", á mynd 2.

## Samanberingar

Staðarnøvnini á staðnum benda á, at seyðamjólking er farin fram her, eftirsum at bólið

*(framhald á síðu 31)*

# Familjubuffét

**Mán-Hós: Kl. 16.30 – 20.00**
**Fríggjadag: Kl. 16.30 – 21.00**
**Leygardag og Sunnudag: Kl. 13.00 – 21.00**



## Et, alt tú orkar, fyri 139,-

**(12 ár og eldri | Íroknað ísbuffét, sodavatn og kaffi/te)**

## Og títt barn etur fyri einans 70,-

**(11 ár og yngri, saman við foreldrum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

## Bólkar (min. 10 fólk) 100,-

**(11 ár og yngri, saman við minst einum gjaldandi vaksnum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

**Lat okkum ordna innkeypið og uppvaskið**

PIZZA 67

**www.pizza67.fo – Tel 356767**

Vit hava 3 sløg av pizza, salat, 4 sløg av dressingi, nachos, nýbakað hvítleyks-breyð, høsnagrýtu, nuggets, buffalo høsnaveingir, várrullur, chips, rís og 5 sløg av sodavatni, og omaná fáa tit 7 sløg av ísi og kaffi.


SANSIR
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 – 223124

SPORT 24

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

**WWW.SKALKUR.FO**

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |


SPEKT
løggildir grannskoðarar
Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Heildarloysn til kappingarføran prís
lætt og ómakaleyst
XBRL, skatt, bókhald, MVG, roknskap og annað
Ring ella les meira um okkara heildarloysnir á www.spekt.fo


Frá stórum til smærri
MASKINGREVSTUR
- PLANERING
- ÚTGREVSTUR
- BREKKING
Tilboð verða latin
Vit hava maskinur til hvørja einstøku uppgávu
Maskingrevstur v/Allan H. Hansen · 370 Miðvágur · tel 22 22 41

# Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort



(framhald av síðu 25)

liggur á "Lambatrøðni", og áin beint við eitur "Lambá", og er "Lambhylur" eisini tætt við hetta ból. Staðarnavnið "Lambá" er eisini spennandi í hesum sambandi, eftirsum mann í Íslandi í summum førum rak lombini tvørtur um eina "Lambá" fyri, at forða teimum at súgva, og at mann í øðrum førum rak tey út í hagan; og til aðrar tíðir nýtti kelvi fyri at forða lombunum at súgva.

**Samanumtøka**

Bæði staðarnøvn og fornleivdir á staðnum benda á, at seyðamjólking kann vera farin fram á staðnum. Men tað er tó alt ov óvíst at siga hetta fyri vist; tað muga útgravingar til fyri at vátta hesum.




***Mynd 3: Dupultbólið á Lambatrøðni í Miðvági, áin eitur Lambá. Pílarnir vísa frágarðar oman frá bólinum. T. Niclasen greiddi frá, at hetta bólið ongantíð hevði verið nýtt sum vanligt ból, men onki varð sagt um, hvat tað var nýtt til (A.Poulsen 2016).*** (Kortal.fo.)

HIDDEN**FJORD**

RAISED IN THE WILD

# Fyrsti alari í heiminum at gevast við flogflutningi

At flúgva vøru elvir til óneyðugt CO2-útlát.
Ov nógv CO2-útlát elvir til veðurlagsbroytingar.

